# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Tað gongur rætta vegin hjá dómarunum

***Dómarar:** Dómarafelagið ætlar sær miðvíst at arbeiða fyri at halda teimum, sum hava útbúgving til at døma*



Føroyskir fótbóltsdómarar hildu um vikuskiftið til á Hotel Føroyum. Teir vóru á skeiði, sum norðmaðurin Reidar Björnstad hevði ábyrgdina av, og fríggjakvøldið hevði dómarafelagið ársaðalfund. Lassin Isaksen, sum hevur verið í nevndini síðani 1991, stóð fyri valið og varð afturvaldur.

Hinir báðir nevndarlimirnir eru Hans Falkvard Hansen og Tummas Pauli Olsen. Eftir fundin skipaði nevndin seg. Lassin Isaksen, sum hevur verið formaður øll árini síðani 1991, ynskti ikki at halda fram. Í hansara stað varð Hans Falkvard Hansen valdur til nýggjan formann. Tummas Pauli Olsen er skrivari, og Lassin Isaksen er kassameistari.

26 dómarar, sum eru ætlaðir at døma í 1. og 2. deild, vóru á skeiðnum, og umframt teir vóru eisini fleiri aðrir luttakarar. Teirra millum vóru FSF umboð, sum hava við dømingina at gera, og onkrir dómaraeygleiðarar.

### Eru betri fyri

Lassin Isaksen heldur, at tað er hugaligt at merkja, at áhugin fyri at døma er vaksandi, og at dómararnir tykjast vera alt betri fyri:

– Leygardagin vóru dómararnir til roynd í, hvussu væl teir eru fyri. Støðan kundi verið betri, enn hon er, men tað hugaliga er, at dómararnir tykjast vera betri fyri, enn teir áður hava verið. Teir flestu stóðu royndina við ein glans, og teir fáu, sum ikki gjørdu tað, fáa ein nýggjan møguleika um tríggjar vikur.

Royndin hjá dómarunum var tað, teir kalla bib royndin ella ein yoyo roynd, sum tað eisini verður nevnt. Um úrslitini verða umroknað til tað meiri kendu cooper royndina, so var miðaltalið fyri teinin hjá dómarunum umleið 2700 metrar í tólv minuttir.

– Vit eru nøgdir við hetta. Tað, sum vit harmast um og ætla at gera nakað við, er, at fleiri, sum hava lokið dómaraprógv og sum áður hava dømt ikki eru aktivir meiri. Semja var millum luttakararnar um at arbeiða miðvíst við at kveikja áhugan millum hesar dómararnar aftur.

### Fóru víða

Norski gesturin greiddi á skeiðnum frá tí, sum gongur fyri seg í norsku dómaraverðini:

– Broytingar eru á skránni alla tíðina. Í fjør vóru tær ikki so sjónligar, men vit skilja á lagnum, at í sambandi við EM endaspælið í summar fer okkurt nýtt at vera á skránni. Higartil hevur tað verið soleiðis, at formliga hevur dómarin verið tann, sum dømdi, meðan hjálpardómararnir hava markerað, og so hevur tað verið ábyrgdin hjá dómaranum at avgera, um tað skal dømast ella ikki. Ætlanin er nú, at hjálpardómarin – umframt rangstøðuna, innkastini og hornaspørkini/málspørkini – eisini skal døma fríspark og annað sovorðið, veit Lassin Isaksen at siga.

Niklas á Líðarenda og Jógvan Jensen eru lógtulkarar og lærumeistarar í føroyskari fótbóltsdøming. Teir høvdu báðir orðið á skeiðnum. Niklas greiddi frá, hvussu hann fyrireikar seg til eitt kappingarár og til ein einstakan dyst, og Egga Jensen legði í sínum innleggi størsta dendin á upphitingina.

Tað er semja um, at nú skal tað í sambandi við 1. deildardystirnar á mannfólkasíðuni markerast við, hvussu nógva tíð dómarin hevur lagt afturat vanligu leiktíðini:

– Vit hava ikki 4. dómarar í Føroyum, og tað hevur onkrar praktiskar trupulleikar við sær. Men teir eru ikki størri, enn at teir kunnu loysast. Hvussu hetta verður gjørt er ikki greitt enn, men tað er semja um, at hetta skal roynast í hesum fótbóltsárinum, sigur Lassin Isaksen.

Dómarafelagið hevur tveir limir í dómaranevndini hjá FSF. Teir eru Jákup F. Joensen og Øssur Mohr. FSF umboðini í nevndini eru Óli Holm og Karl Vidtfeldt.

JH

# Javnt í Silkeborg

*Ein dystur varð leiktur í donsku superliguni mánakvøldið*

Jákup Mørk

Silkeborg og Aab, sum bæði teljast millum liðini, ið elta oddafiskarnar úr Herfølge, hittust í Silkeborg mánakvøldið.

Eftir ein heldur deydligan fyrra hálvleik, legði toppskjúttin í superliguni, Peter Lassen, Silkeborg fram um, tá bert ein lítil minuttur varð leiktur av seinna hálvleiki.

Henda støða helt sær, til bert fimm minuttir vóru eftir at leika. Tá javnaði Søren Frederiksen fyri Aab, soleiðis at endaliga støðan gjørdist javnleikur 1-1.

Eftir dystin er støðan í superliguni tann, at Silkebort og Aab eru á fimta og sætta plássið, ávíkavist seks og sjey stig aftan fyri Herfølge.

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herf. | 20 | 11 - 4 - 5 | 32 | 26 | 6 | 37 |
| 2 | Brøndby | 20 | 10 - 4 - 6 | 35 | 22 | 13 | 34 |
| 3 | Lyngby | 20 | 10 - 2 - 8 | 31 | 28 | 3 | 32 |
| 4 | Viborg | 20 | 9 - 5 - 6 | 27 | 26 | 1 | 32 |
| 5 | Silkeb. | 20 | 8 - 7 - 5 | 36 | 19 | 17 | 31 |
| 6 | AaB | 20 | 7 - 9 - 4 | 31 | 23 | 8 | 30 |
| 7 | AB | 20 | 8 - 6 - 6 | 31 | 26 | 5 | 30 |
| 8 | FCK | 20 | 7 - 4 - 9 | 20 | 19 | 1 | 25 |
| 9 | OB | 20 | 4 - 8 - 8 | 16 | 26 | -10 | 20 |
| 10 | AGF | 19 | 4 - 6 - 9 | 17 | 29 | -12 | 18 |
| 11 | Esbjerg | 20 | 3 - 9 - 8 | 21 | 37 | -16 | 18 |
| 12 | Vejle | 19 | 5 - 2 - 12 | 20 | 36 | -16 | 17 |

ÍtróttaSosialurin kann eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Firmakapping

*Vikuskiftið 1. og 2. apríl verður firmakapping í fótbólti á Kambsdali*

Jákup Mørk

Sum vanligt hevur verið seinnu árini, hava eisini í vetur verið hópin av innandura fótbóltskappingum hildnar kring landið, og í hesum hava fótbóltsleikarar úr ymsu feløgunum havt møguleika at halda formin við líka.

Summar kappingar eru tó ikki ætlaðar teimum, sum vanliga spæla fótbólt á høgum støði, men hinvegin leikarum, sum kanska bert hugna sær av og á við hesum ítrivi.

Annað vikuskiftið skipar eldrafelagið, Fjallið, í Leirvík fyri eini sonevndari firmakapping inni á Kambsdali, har hesir »hugnaleikarar« hava møguleika at royna seg.

Reglurnar fyri kappingina eru soleiðis, at fimm leikarar kunnu vera á hvørjum liðið, umframt ein skiftisleikara, og verða hondbóltsmál nýtt. Harumframt verður sett sum treyt, at hvørt liðið í mesta lagi kann hava ein leikara, sum hevur leikt við onkrum liði í trimum teimum bestu fótbóltsdeildunum undanfarna kappingarár.

Kostnaður fyri luttøkuna er 400 kr., og fer tilmelding fram 26. og 29. mars millum klokkan 20.00 og 22.00 á tlf. 443023

# Fyrsta rennikappingin

*Fyrsta rennikappingin í ár verður í Runavík komandi leygardag*

Jákup Mørk

Eftir at steðgur hevur verið í rennikappingunum í einar tríggjar mánaðar, fara ymsu feløgini kring landið nú aftur undir at fyriskipað kappingar..

Rennifelagið, Roysnið, hevur boðað frá, at fysta kappingin verður í Runavík komandi leygardag, og verður teinurin, ið rennast skal, 10 km til longdar. Hetta verður tó gjørt soleiðis, at runnið verður frá Sjómansheiminum, kring keiøkið úti móti Føroya Banka og aftur til Sjómansheimið níggju ferðir.

### Fyri øll

Hóast talan er rennikapping, so er ætlanin við hesum fyrst og fremst, at øll tey, sum hava hug at royna seg, skulu hava ein møguleika til tess.

Hetta er triðja árið at hesin teinurin verður runnin, og vinnari undanfarna ár varð Sølvi R .Hansen, sum rann teinin í tíðini, 34 minuttir og 20 sekund.

Eftir ætlan skulu einar 20 ymsar rennikappingar haldast kring landið, og verður ein kappingarskrá kunngjørd ein av komandi døgunum.





# Róðrafelagið hjá NSÍ leggur allar árar í sjógv

***Kappróður:** Kappróðrarfelagið í Runavíkar kommunu fer í summar at manna fimm bátar við sjey manningum, og eru hetta tvær fleiri enn talan hevur verið um undanfarnu árini. Til endamálið hevur felagið keypt gamla skopuning*

Farið er um várjavndøgur. Tað er ein mánaður til flaggdagin, og tá fara kappróðrarbátarnir, sum nú verða pussaðir upp, at síggjast á firðum, víkum og sundum.

Áhugin fyri kappróðrinum tykist vera stórur nógva staðni kring landið, og hann er serliga stórur í summum plássum. Eitt av hesum støðunum er í Runavíkar kommunu. Higartil hevur nýggja róðrarfelagið NSÍ tikið lut í kappróðrinum við trimum bátum – Tjaldrinum, Sølmundi og Eysturoyingi – men í ár fer felagið at manna fimm bátar við ikki færri enn sjey manningum.

Umframt teir tríggjar omanfyri nevndu bátarnar fara teir í Runavík í summar eisini at manna Heiðabátin og Toftabátin. Heiðabáturin er áttamannafarið, sum higartil hevur itið Skopuningur. Kappróðrarfelagið NSÍ fekk bátin í fjør.

Teir í kappróðrarfelagnum í Runavíkar kommunu hava rættuliga pussað seksmannafarið upp, soleiðis at hann so at siga er sum nýggjur, nú teir fara at flota hann aftur. Navnið, Heiðabáturin, kemst sjálvandi av, at økið eystanfyri á Skálafjørðinum, sum nú er so fjølbygt, varð kallað – og verður tað framvegis av nógvum – í Heiðunum.

NSÍ hevur ikki tikið lut í kappingini millum áttamannafør tey seinnu árini.

Stóri áhugin fyri at sleppa upp í part at rógva hevur havt við sær, at felagið hevur verið úti á Toftum og gjørt avtalu um at brúka Toftabátin. Áttamannafarið hjá toftamonnum hevur ikki verið við í kappróðrinum tey seinnu árini.

### Flaggskipið

At áhugin fyri kappróðrinum er so nógv øktur á Skálafjørðinum man ikki minst komast av, at Eysturoyingurin, sum felagið fekk fyri tveimum árum síðani, hevur vunnið allar róðrarnar tey bæði seinastu árini. Manningin á 10–mannafarinum skal aftur í ár til Scilly oyggjarnar, og verður farið avstað flaggdagin, 25. apríl.

Flestu teirra, sum hava mannað bátin hesi bæði seinnu árini, fara at vera við aftur, tá sett verður á málið, sum er at vinna allar FM róðrarnar trý ár á rað. Tað hevur eingin nakrantíð áður megnað.

Kappróðrarfelagið NSÍ er komið væl áleiðis við nýggjum og stórum neysti, sum verður bygt í gomlu støðni á Glyvrum. Nógv sjálvboðið arbeiðið er lagt í, og nú eru teir komnir so mikið langt, at neystið longu í summar fer at verða karmur um kappróðrarlívið í Runavíkar kommunu.

Sum tað sæst í lýsing í blaðnum í dag, so ætlar felagið nú at fáa sær búmerki.

Tey, sum manna nevndina í felagnum, eru: Sofus T. Hansen, formaður, Rodmundur Nielsen, peningarøkil, Maud Túgvustein, skrivari, Sunvard Vang og Eiler Lamhauge.



# Ayr vann uttan Jens Kristian

*Jens Kristian Hansen var ikki við, tá Ayr leygardagin vann 4-0 á Clydebank. Væntandi verður framhaldandi lagna hansara avgjørd ein av fyrstu døgunum*

Jákup Mørk

Ayr United, sum framhaldandi hevur føroyska landsliðsleikaran, Jens Kristian Hansen, í leikarahópinum, leikti leygardagin á heimavølli móti Clydebank, sum liggur aftast í næsbestu skotsku deildini.

Úrslitið gjørdist ein greiður 4-0 sigur til heimaliðið, men tølini snýta kanska nakað, tí tá tíggju minuttir vóru eftir at leika, var tað bert eitt mál á muni millum liðini.

Tað var Glynn Hurst, sum um miðjan fyrra hálvleik legði Ayr fram um. Í 80. minutti økti David Craig til 2-0 áðrenn Hurst við stuttum millumbilum skeyt Ayr upp á 3- og 4-0.

### Tosaði við leiðsluna í gjár

Jens Kristian Hansen, sum hugdi at dystinum frá áskoðaraplássunum segði við Sosialin, at talan var als ikki um tað stóra fótbóltsupplivilsi. Clydebank eru langt aftasti í deildini, og sambært føroyska leikaranum høvdu teir valla staðið seg í bestu føroysku deildini. Heldur ikki var hann nøgdur við spælið hjá liðfeløgunum, men sum hann sigur, so komu stigini kortini til høldar.

Sum nevnt, so var Jens Kristian ikki millum leikararnar á vøllinum í dystinum leygardagin, og tá vit í gjár tosaðu við hann, var hann júst á veg til venjingardyst við eykaliðnum, sum skuldi spæla móti eykaliðnum hjá Hearts, sum annars telist millum feløgini í skotsku Premier League.

Enn er framhaldandi lagnan hjá føroyska landsliðsskiparanum ikki avgreidd við 100% vissu, men eftir ætlan skuldi hann tosa við leiðslu felagsins eftir dystin, t.v.s seinnapartin í gjár. Skal nakar sáttmáli spyrjast burtur úr leigumálinum við skotarnar, fræ ttist helst um hetta ein av komandi døgunum, tí leigumálið rennur út saman við hesum mánaðinum.

Áður hevur Jens Kristian givið til kennar, at hann helst vendur aftur til B36 tá leigumálið er runnið, men meira fræ ttist helst um hetta ein av komandi døgunum.

**Støðan í skotsku 1. deild**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | St. Mirren | 29 | 18 - 6 - 5 | 66 | 32 | 34 | 60 |
| 2 | Falkirk | 29 | 17 - 5 - 7 | 57 | 33 | 24 | 56 |
| 3 | Dunferml. | 29 | 15 - 10 - 4 | 50 | 28 | 22 | 55 |
| 4 | Raith | 29 | 14 - 7 - 8 | 49 | 33 | 16 | 49 |
| 5 | Livingston | 28 | 13 - 7 - 8 | 44 | 34 | 10 | 46 |
| 6 | Inverness | 29 | 11 - 8 - 10 | 48 | 43 | 5 | 41 |
| 7 | Ayr | 29 | 9 - 6 - 14 | 34 | 39 | -5 | 33 |
| 8 | Morton | 29 | 8 - 6 - 15 | 39 | 51 | -12 | 30 |
| 9 | Airdrie | 28 | 5 - 7 - 16 | 19 | 59 | -40 | 22 |
| 10 | Clydebank | 29 | 1 - 4 - 24 | 16 | 70 | -54 | 7 |

BÚMERKJAKAPPING

Kappróðrarfelagið NSÍ skrivar hervið út kapping um tekning av búmerki, og viðmerkjast skal, at felagið einsamalt einki búmerki hevur havt frammanundan, so nýtt sum tað er.

Búmerkið kann vera í einum ella fleiri litum, men tað skal eisini kunna prentast í einum liti.

Virðislønirnar, ið latnar verða, eru hesar:
**Nr 1. kr. 3.000,-**
**Nr. 2. kr. 700,-**
**Nr. 3 kr. 300,-**

Ætlanin er at brúka búmerkið nú, tá ið tað í vár verður farið undir aftur kappróðurin. Tískil verður evstamark fyri innlating av uppskotum sett til 15. apríl 2000.

Felagið hevur sett eina dómsnevnd, at taka støðu til innkomnu uppskotini. Í henni eru Tórbjørn Jacobsen, Kaj Aage Troest og Símun Nónklett.

Kappróðrarfelagið NSÍ skilar sær rætt til at nýta innkomið uppskot sum búmerki felagsins, ella ikki at nýta nakað av innkomnu uppskotunum sum nýtt búmerki.

Kappróðrarfelagið NSÍ varð stovnað í mai mánað 1999 . Virkisøkið er í Runavíkar Kommunu. Í góðari semju tók felagið seg burturúr ítróttarfelagnum NSÍ. Hetta var bara ein partur av politikkinum í økinum hesi seinnu árini. Mett verður, at ítróttargreinarnar betri kunnu mennast í egnum feløgum.

Í summar fer felagið at taka lut í kappróðrinum við sjey manningum í fimm bátum. Felagið er komið væl áleiðis við nýggjum, stórum neysti, sum er í ger í gomlu støðni á Glyvrum.

Uppskotini til nýtt búmerki skulu sendast til:

**Kappróðrarfelagið NSÍ**
**Att.: Rodmundur Nielsen**
**Sýnavegur**
**FO-625 Glyvrar**

Sosialurin - 311820

KAPPRÓÐRARFELAGIÐ NSÍ